ítróttur

Nr. 18 • mikudagur • 28. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# FSF vil ikki vita av Dánjali

**Meirilutin í nevndini í Fótbóltssambandinum boðaði í gjár feløgunum frá, at teir skjóta upp, at Rúni Heinesen verður valdur til formann í FSF**

*Alt bendir á, at tíðarskeiðið hjá Dánjal Andreasen sum FSF-formaður er av á komandi aðalfundinum. Hóast hann sjálvur hevur boðað frá, at hann tekur við afturvali, so peikar nevndin á annan kandidat, og tað fær neyvan verið annað enn eitt misálit á formannin*



FSF UPPGERÐ

*Jákup Mørk*

Fyri fyrstu ferð í 25 ára longu søguni hjá Fótbóltssambandi Føroya verður lagt upp til, at formaðurin skal skiftast út, sjálvt um formaðurin er áhugaður í at halda fram. Í gjár varð skriv sent limafeløgunum í FSF viðvíkjandi ársaðalfundinum. Har verður boðað frá, at uppskotið hjá nevndini til formann er Rúni Heinesen. Hetta er annar aðalfundurin á rað, at tað verður lagt upp til kapping ella rættari stríð um týdningarmiklan sess. Í fjør bjóðaði Niklas á Líðarenda Børga B. Hansen, sum hevði verið næstformaður øll árini, síðani FSF varð stovnað í 1979, av. Avbjóðarin vann, tí gamli næstformaðurin tók seg aftur, áðrenn tað varð atkvøtt.

Tað ljóðaði í heyst, at Dánjal Andreasen ikki fór at stilla uppaftur, tá ið fyrsta tvey ára skeiðið hjá honum í formansessinum var lokið, nú tá ið aðalfundurin verður. Men Dánjal tók sjálvur broddin av hesum tíðindunum. Tá ið feløgini og FSF nevndin vóru saman fyri at eftirmeta farna kappingarárið og tosa um nýggja árið, boðaði Dánjal Andreasen frá, at hann ætlaði sær at halda fram sum formaður. Hann segði seg samstundis ikki skilja, hví tíðindini vóru farin at ganga, sum søgdu, at hann ikki fór at halda fram.

Hesin fundurin var 15. november. Tað eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á Dánjali Andreasen í gjár. Saman við Jógvani Martin Olsen og Karl Vidtfeldt var hann á veg til altjóða fótbóltsfund í Berlin.

Dánjal Andreasen varð valdur til FSF formann á aðalfundinum fyri tveimum árum síðani, tá ið Torleif Sigurðsson, sum hevði verið formaður síðani á heysti í 1981, legði frá sær.

Frammanundan formansvalinum í 2002 varð nógv tosað og skrivað, áðrenn FSF nevndin kom við sínum uppskoti um at velja Dánjal Andreasen til formann. Eitt nú vórðu bæði Christian Andreasen, sum nú er nevndarlimur í FSF, og Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, nevndir sum møgulig valevni. Tá ið avtornaði var bara Dánjal Andreasen í uppskoti, men nú vil nevndin ikki skjóta hann uppaftur. Í fráboðanini til feløgini verður sagt, at Dánjal sjálvur sigur seg vilja taka við afturvali, men at meirilutin í nevndini skjýtur Rúna Heinesen upp sum formansevni.

### Fýra av sjey aftanfyri Rúna

Á keldum uttanfyri FSF, men sum kortini hava gott innlit í, hvat gongur fyri seg í nevndini, hava vit skilt, at tað í eina tíð hevur verið arbeitt við at finna nýtt formansvalevni. Nevndararbeiðið hevur ikki gingið nakað serligt, og viðurskiftini millum meirilutan í nevndini og formannin hava ikki verið nakað at rópa hurrá fyri.

Tað sigst, at formansspurningurin hevur verið viðgjørdur á trimum nevndarfundum. Síðsti fundurin var nú mánakvøldið. Tá gjørdi meirilutin í nevndini greitt, at teir fóru at skjóta Rúna Heinesen upp sum formann. Í meirilutanum eru Niklas á Líðarenda, næstformaður, Karl Vidtfeldt, formaður í kappingarnevndini, Christian Andreasen og Rúni Heinesen, formaður í útbúgvingarnevndini.

Rúni Heinesen, sum er útbúgvin verkfrøðingur starvast sum skúlastjóri á tekniska skúlanum í Klaksvík. Hann hevur verið nevndarlimur í FSF síðani 2002, men undan hesum hevur hann í fleiri umførum verið nær knýttur at FSF, har hann hevur virkað sum konsulentur innan fyri graslíkisvallir.

Aðalfundurin í FSF verður leygardagin, 14. februar. Síðsta freist at koma við uppskotum til formann og nevndarlimir er hósdagin, 5. februar. Umframt Dánjal Andreasen, formann, standa Rúni Heinesen, Christian Andreasen og Karl Vidtfeldt. Christian Andreasen og Karl Vidtfeldt taka við afturvali til nevndina.

Á aðalfundinum hevur FSF nevndin eina atkvøðu. Í FSF eru 21 limafeløg, sum hava hvør sína atkvøðu, soleiðis at talan í alt er um 22 atkvøður.



*Stendur tað til nevndina, so verður Rúni Heinesen úr Klaksvík nýggjur føroyskur fótbóltsbossur. Freistin at skjóta onnur formansevni er tó ikki runnin fyrr enn hósdagin, 5. februar*



# Billardrisar ruddaðu borðið



*Ólavur Kjølbro úr Klaksvíkar Billardfelag*



*Steinbjørn í Dali spælir fyri Kaggan 2*

**Við meðaltølum uppá 32, 31 og 25 hava spælarar hjá Kagganum og Klaksvíkar Billardfelag víst, at enn eru knotur í føroyskum billardsspælarum. Bjarni Skaalum og Ólavur Kjølbro vístu framúr gott spæl í Klaksvík herfyri**

BILLARD

*Tíðindaskriv*

Herfyri leiktu 1. deildarliðini hjá Kagganum og Klaksvíkar Billardfelag. Klaksvíkingar vístu, hvat teir veruliga duga til, tá tað kemur til avgerandi dystir. Teir vunnu 14-4 á einum kaggaliði, sum tó megnaði at fáa nógv eygu. Besti maður var Ólavur Kjølbro, sum vann allar sínar dystir og hevði eitt meðal uppá 31 eygu. Hetta vísir, at klaksvíkingar ikki bert eiga ein dugnaligan Føroyameistara í Krisjan Suna Høgensen, teir hava eisini ein ungan spælara í Ólavi, sum kann koma langt í komandi kappingum, og her hugsa vit eisini um FM fyri einstaklingar. Við hesum úrslitinum hevur hann víst, at tað er eingin sjálvfylgja, at verandi meistari endurvinnur sítt heiti. Vit skulu heldur ikki gloyma, at Henrik Petersen eisini er við í ár. Men lat okkum ikki gloyma flotta úrslitið hjá øllum liðnum. Sonhard Johannesen var eisini í tí góða hjørninum henda dagin og vann allar sínar dystir og við einum meðal uppá 25,23 eygu. Krisjan Sune Høgnesen mátti í hesi kappingini lúta í tveimum av dystunum og hevði eisini lægsta meðaltalið hjá liðnum 24,67 eygu. Ja, soleiðis kann tað ganga upp og niður í billard, eisini hjá teimum bestu.

Á Kaggaliðnum var Bjarni Skaalum nógv bestur. Hann vann bert ein dyst, men hann hevði kanska sítt besta meðaltal nakrantíð í eini kapping, 32,33 eygu. Hetta er einastandandi og lovar eisini gott fyri, at vit í ár fara at fáa eina sera spennandi kapping um FM heitið fyri einstaklingar. Eisini gjørdi Bjarni tað bragd at fáa omanfyri 800 í einum dysti. Johannes Skaarup vann hin dystin á Kaggaliðnum og hevði eitt av sínum heilt góðu meðaltølum við 23,10 eygum. Hesaferð eydnaðist ikki Anfinni Hjalmarsson at gera tær stóru skreytirnar. Hann tapti allar dystirnar og hevði 18,50 eygu í meðal.

Kaggin 2 hevði herfyri vitjan av Tvøroyar Klubba, sum vann 10-8. Hetta úrslit merkir, at Kaggin 2 liggur niðast í deildini. Tvøramenn eru eitt vet frammanfyri. Annars liggur Klaksvíkar Billardfelag klárt á odda.

Í 2. deild hevur verið dystur millum Klaksvíkar Klubba 2 og Havnar Klubba. Havnamenn vunnu 10-8. Besti maður í kappingini var Jógvan Jørgensen úr HK við seks stigum og 11,443 eygum í meðal. Hans Jørn Nielsen og Høgni Højgaard høvdu ávikavist 10 og 8 eygu í meðal. Á liðnum hjá klaksvíkingum var Ørvur Heinesen bestur við 4 stigum og 12 eygum í meðal. Tórur Andreassen, ein gamal kenningur úr Klaksvíkar Klubbatíðini og tá á 1. Deild, vann ein dyst og hevði 12,40 eygu í meðal. Triði maður á liðnum var Óli Biskupsstøð við 11,43 eygum í meðal.



*Bjarni Skaalum úr Kagganum*

## Billardstøður

**Støðan, 1. deild**

| | Dystir | Eygu | Miðal | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Billardfelag | 4 | 17504 | 24,31 | 62 |
| 2 Kaggin 1 | 4 | 14182 | 19,70 | 42 |
| 3 Havnar Klubbi | 4 | 13962 | 19,39 | 28 |
| 4 Tvøroyrar Billardfelag | 4 | 11088 | 15,40 | 26 |
| 5 Kaggin 2 | 4 | 11048 | 15,34 | 22 |

**Støðan, 2. deild**

| | Dystir | Eygu | M iðal | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Billardfelag2 | 4 | 7944 | 11,03 | 52 |
| 2 Havnar Klubbi | 4 | 6696 | 9,30 | 49 |
| 3 Klaksvíkar Billardfelag1 | 4 | 6780 | 9,42 | 42 |
| 4 Kaggin | 4 | 5920 | 8,22 | 33 |
| 5 Tvøroyrar Billardfelag | 4 | 3612 | 5,02 | 4 |

# Finalistarnir skulu finnast II

**Marian Cirloganescu verður ikki tøkur komandi seks vikurnar hjá StÍF, sum í kvøld verður partur av eini av teimum fýra hálvfinalunum, sum verða leiktar kring landið**

COCA-COLA KAPPINGIN

*Jákup Mørk*

Seinnu hálvfinalurnar í Coca-Cola kappingini í hondbólti verða leiktar mikukvøldið.

Hjá kvinnunum tykist størsti spenningurin vera um dystin í Vági, har VÍF er á vitjan. Her hevur VB eina leiðslu á trý mál frá fyrra dystinum, og við fyrimuninum av heimavølli, má VB roknast sum favorittur í hesari uppgerðini, tó at trý mál ikki er nøkur trivalig leiðsla. Mótstøðuliðið hjá vinnaranum av hesi uppgerðini verður uttan iva Stjørnan. Tær vunnu við 10 málum á Kyndli í fyrru uppgerðini, og tað vildi helst verið størsta sensatiónin í føroyskari hondbóltssøgu, um tað á nakran hátt verður pilkað við hesa leiðsluna.

Hjá monnunum bendir nógv á tvær spennandi hálvfinalur. Í Hoyvíki hevur H71 ikki færri enn sjey mál at geva av niður til Kyndil eftir fyrru hálvfinaluna, og einki er at ivast í, at tað skal nakað óvanligt til, um hetta skal broytast. Men bæði Kyndil og H71 hava í ár latið fleiri óvanlig úrslit frá sær – ikki minst í innanhýsis uppgerðunum – og so er spurningurin, hvønn vegin barometrini peika mikukvøldið.

Hin mansdysturin verður á Skála, har StÍF undan dystinum hevur eina tepra eitt-máls leiðslu móti VÍF. Spurningurin er so, hvørt strandingar megna at halda fast um hesa.

Tað er í øllum førum dyggur smeitur fyri StÍF, at skaðin hjá Marian Cirloganescu tykist vera somikið álvarsligur, at talan helst verður um einar seks vikur uttan hondbólt. Hinvegin er Mihai Marinescu nú við aftur, eftir at hann hevur sitið leikbann av sær.

### Dystirnir

**Kvinnur - Dystur:**
Stjørnan-Kyndil
Dómarar: Jákup Símun Simonsen & Høgni M. Joensen

**VB-VÍF**
Dómarar: Hannis Wardum & Uni Wardum

**Menn - StÍF-VÍF**
Dómarar: Kristian Johansen & Sámal Hansen

**H71-Kyndil**
Dómarar: Trygvi Mortensen & Kári Hansen